NIFCA, Nordic Institute for Contemporary Art
Suomenlinna B 28 • FIN-00190 Helsinki • Finland • T: +358 9 686 430 • F: +358 9 668 594 • E: information@nifca.org • www.nifca.org • www.rethinking-nordic-colonialism.org

**TÍÐINDASKRIV**

**A Postcolonial Exhibition Project in Five Acts**

## Triði partur verður latin upp í Havnini 12. mai og heldur á til 4. juni, 2006

***Listaframsýning og filmskrá í Listasavni Føroya 12. mai 12 – 4. juni***
***Letur upp fríggjadagin seinnapart 12. mai frá kl. 17 til 20***
***Undansýning fyri fjølmiðlar fríggjadagin seinnapart 12. mai frá kl. 14 til 16***

***Talað orð/framførslur/tónleikatiltak í Norðurlandahúsinum seinnapart 13. mai frá kl. 17 til 24***

**Stuðlað hevur Kuratorisk Aktion (Frederikke Hansen & Tone Olaf Nielsen) fyri NIFCA, Stovnur norðurlanda fyri samtíðarlist**

**www.rethinking-nordic-colonialism.org**

## At liva í einum eftir-hjálandavørri

Hjálandaveldini ognaðu sær ikki bara lond og náttúrutilfeingi. Tey beindu eisini fyri hugmyndum, trúarlívi og atferðarlagi hjá fólki. Tað er eins satt fyri Norðurlond, ið einaferð vóru løgd undir hjálandaveldi, sum tað er fyri onnur eftir-hjálanda samfeløg í til dømis Afrika, Karibia og Ásia.

Skulu vit skilja, hvussu munir og yvirræði hava lagað seg, og hvussu tey halda fram at skipa sambond millum menniskju nú á døgum, mugu vit hyggja at máli og hugsanum í søguligum samanhangi.

Stórfingna framsýningarverkætlanin ***Rethinking Nordic Colonialism*** fer at gera júst tað, tá ið hon letur upp triðju av fýra listaframsýningum um norðurlendskan hjálandapolitikk í Havn í næstu viku. Hetta verður eitt altjóða tiltak við filmskrá og stórfingnari kvøld-skrá um talaða orðið, við framførslum og livandi tónleiki.

## Listaframsýning og filmsskrá í Listasavni Føroya

Undir yvirskriftini ***At liva (í) einum eftir-hjálandavørri*** fara fýra listafólk, ein listabólkur og ein samgonga millum list og ástøði úr so ymisligum londum sum Grønlandi, Maleysia, Ghana, Suðurkorea/Skandinavia, Føroyum og Indonesia at sýna fram í Listasavni Føroya í tríggjar vikur. Alt byrjar 12. mai.

Sum heitið sipar til, brúka hesir luttakarar list atfinningarsamt at hugleiða um fløktar sálarligar og samfelagsligar støður, sum taka seg upp í kjalarvørrinum á hjálandaveldi, eftir at tað formliga er av. Fram um alt hyggja tey gjølla at, hvussu hjálandasambond – t.e. sambond við munum og yvirræði –eru ímyndað,

søgd og leikt á palli. Tey kanna, hvussu mál og kroppur verða brúkt í sambandi við  landslag, minni, søgu, tjóðarbygging, kynssamleika og barnaættleiðing úr ymsum fólkasløgum.

Framsýnandi listafólkini eru **Pia Arke** (Grønland/Danmark), **Nadiah Bamadhaj** (Malaysia/Indonesia), **Godfried Donkor** (Ghana/Bretlandi), **Jane Jin Kaisen & Tobias Hübinette** (Suðurkorea/Danmark & Suðurkorea/Svøríki), **Rannvá Holm Mortensen** (Føroyum), and **Ruangrupa** (Indonesia).

Listasavn Føroya fer eisini at verða vertur fyri filmskránna ***Silver Screen Resistance***, sum sýnir filmar úr fýra tíggjuáraskeiðum av eftir-hjálanda atfinningarsemi í filmslist eftir so viðurkendar filmsmiðir sum: **Stephanie Black** (USA), **Randi Broberg** (Grønland), **Laila Hansen** (Grønland), **Isaac Julien** (Bretland), **Alanis Obomsawin** (Abenaki, Kanada), **Pratibha Parmar** (Kenya/Bretland), **Gillo Pontecorvo** (Italia), and **Paul-Anders Simma** (Sámi, Noreg/Svøríki/Finnland). [Vilja tygum vita neyvari sýningartíðir, farið vinaliga inn á www.rethinking-nordic-colonialism.org/film.html]

Meðan upplatingarmóttøka verður, fara Jane Jin Kaisen & Tobias Hübinette at framføra fyrsta part av margmiðla-framførsluni "Transmitting: (Dis)ComfortAN(d)AlieNation". Annar og seinasti partur verður framførdur tann 13. mai í Norðurlandahúsinum. [Innbjóðingarkort til framsýningarupplatingina og fullfíggjað framsýningarskrá eru viðfest]

## Talað orð/ framførsla/tónleikatiltak í Norðurlandahúsinum

Hesa náttina fer Norðurlandahúsið at umboða ein makaleysan samruna av atfinningarsomum røddum frá øllum jarðarknøttinum. **HYDROXYBROMIDE** – ein DJ-duo úr Jakarta – fer at flætta sínar drynjandi tónar inn í náttina.

Undir heitinum ***At finna instu sjálvsmyndina aftur í eftir-hjálondum*** fer skráin at bjóða fram listafólk, sum seta seg upp ímóti samleika-fyrimyndum í hjálondum.
Kvøldið byrjar við **Jane Jin Kaisen** og fyrilesaranum **Tobias Hübinette,** sum sýna annan part av síni margmiðla-framførslu.
Eftir tað fer kambodiski, muslimski, amerikanski listarmaðurin **Anida Yoeu Esguerra** at hugleiða um samleikablending í einum framførsluparti, sum blandar yrkingar og performance.
Karibiski aktivisturin og sjónleikarin **Imani Henry** fer síðan at geva okkum eina kabarett-líka framførslu, sum varpar ljós á arvin eftir trældóm og  hjálandaveldi í innflytarasamfeløgunum í Brooklyn.
Áðrenn náttin endar við einum bólki, ið dansar indonesiskan dans, fer **200** – sjálvstøðugi punk-rokk bólkurin úr Havn – á pallin og framførir eitt átak fyri Føroyskum sjálvræði og einum opnari og tollyndari samfelag. [Til ber at biðja um beinleiðis tulking/týðing] [Vilja tygum hava fullfíggjaða skrá fyri kvøldið, gerið so væl og farið inn á www.rethinking-nordic-colonialism.org/act3.html#event]

## Samanhangurin: Undanfarnir og komandi partar

Fyrsti partur av ***Rethinking Nordic Colonialism*** læt upp í Íslandi í mars. Eini tíggju altjóða listafólk, ástøðingar, og aktivistar skiftu orð um gloymdu norðurlendsku hjálandatíðina, og hvussu hon heldur fram at laga norðurlendsku samfeløgini nú á døgum – sjálvt tá ið hon verður hildin niðri.
Fyrsti partur gav nøkur greiningaramboð at halda fram við orðaskiftinum um norðurlendskt hjálandaveldi. Annar partur, sum varð pallsettur í Nuuk í apríl, brúkti hesi tól at skapa eitt opið rúm, har fólk kunnu seta orð á sínar kenslur og hugsanir um at vera borgari í einum samfelag, ið roynir at smoyggja hjálandaveldið av sær – fyrst og fremst við atliti at nútíðar Grønlandi.
Við at taka slíkar lívsroyndir eitt stig longur fram á leið, fer triði partur nú at skifta orð um, hvussu mál og kroppur brúka ta kraft, sum er í hjálondum.
Í juni fer verkætlanin til Sámi-leiðirnar í Finnlandi, har listaligur og intellektuellur hugur verður savnaður um áhugan hjá teim innføddu fyri heimsbúskapi.

***Rethinking Nordic Colonialism*** verður krýnt á tann hátt, at eitt DVD Box Set verður útgivið seinast í árinum, sum skjalfestir alla verkætlanina. Tað verður fimti og seinasti partur av verkætlanini. Samantalt verða 56 luttakarar úr øllum heiminum navnkendir í verkætlanini. Tey fara øll at greiða frá hjálanda og eftir-hjálanda royndum og ætlanum, meðan verkætlanin er í gongd.
***Rethinking Nordic Colonialism*** umboðar eina fyrstu roynd at skriva eina víðfevnda søgu um norðurlendska hjálandatíð, og hon tekur øll Norðurlond uppí. Hon er grundað á serskildan felagsskap ímillum týðandi lista- og mentanarstovnar í økinum og setur fyrstu skorðurnar undir at kanna eftir-hjálandatíð á norðurleiðum.

## Útgáva

Saman við ***Rethinking Nordic Colonialism*** er brúkaravegleiðin, sum telur 148 síður, við nágreiniligari skrá til øll tiltøk og nágreiniligari lýsing av øllum luttakarum og teirra tilfari. Brúkaravegleiðingin er tøk á øllum framsýningarstøðum ella kann fáast frá **nifca@nifca.org**. Upplýsingar um luttakarar og skráir eru eisini tøkar á-linju hjá **www.rethinking-nordic-colonialism.org**.

## 3. partur – Staðir og atgongd

Listasavn Føroya, Gundadalsvegur 9, 110 Tórshavn, +298 31 35 79,
info@art.fo, www.art.fo. Týsdag – fríggjadag, kl. 11 – 16, leygardag – sunnudag kl. 14 – 17 sp.
Atgongd: vaksin 60 kr, børn undir 12 ár og skúlaflokkar ókeypis, pensionistar/lesandi/bólkar -10 fólk ella fleiri 40 kr.

Norðurlandahúsið, Norðari Ringvegur, 100 Tórshavn, +298 35 13 51, nlh@nlh.fo, www.nlh.fo.
Atgong til talaða orðið/framførslur/tónleikatiltøk: Vaksin 100 kr, børn undir 12 ár ókeypis og pensionistar/lesandi/bólkar – 10 fólk ella fleiri 50 kr.

## Stuðlað hava

***Rethinking Nordic Colonialism*** er fingið í lag við fíggjarligum stuðli frá: NIFCA, Nordic Institute for Contemporary Art, Nordic Council of Ministers, The Living Art Museum, Stoðir hf., The Reykjavik Academy, Greenland National Museum and Archives, Teachers' Training School of Greenland, The Faroe Islands Art Museum, The Nordic House in the Faroe Islands, Finnish Railways, The Arctic Centre, European Cultural Foundation, The Danish Art Council's Committee for Visual Art, Nordiska Museikommittén, The Danish Arts Council's Committee for International Visual Art, Atlantic Airways Ltd., Embassy of Canada in Finland, Icelandair, Hotel Hans Egede, Svenska kulturfonden, Det Kongelige Grønlandsfond, Arts Council of Lapland, FRAME: Finnish Fund for Art Exchange, Air Logistics Aps, Ljóð-Tøkni, Royal Arctic Line A/S, The Nordic House on Iceland, Hótel Leifur Eiríksson, Dronning Ingrids Hospital – Central Laboratoriet, Nuuk Værft A/S, U.S. Overskudslager, Danske Veteranbiludlejning, Den Danske Trådvarefabrik, Beredskabsstyrelsen, KNR: Greenland National Broadcasting Company, og tað verða fleiri enn…

## Info

Vilja tygum vita meira, setið tygum í samband við fjølmiðlasamskiparan **Hamayun Latif Butt**, +45 22 54 97 27, hamayun@hamayun.cc, www.rethinking-nordic-colonialism.org, www.nifca.org.